Munnlig próvtøka í Enskum 8.fl. Juni 2024 SVL

Próvhoyringin tekur 20 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 20 minuttir íroknað útflýggjan av tilfari og vegleiðing.

Munnliga próvtøkan fevnir um tveir ymiskar partar:

1. Framløga við støði í próvtøkuspurningi um ókendan tekst.

    - Næmingurin kemur inn í royndarhølið og tekur eitt nummar, sum eru knýtt at einum ókendum teksti. Eftir hetta fer næmingurin inn í fyrireikingahølið við einum spurdómi, ið hoyrir til ókenda tekstin.

    - Tá fyrireikingartíðin er liðugt, leggur næmingurin fram fyri lærara og próvdómara. Næmingurin skal greiða frá innihaldinum, evni/tema, seta í frásjón og samanbera við kendan tekst, ið tey hava lisið.

2. Upplestur og samtala við støði í próvtøkuspurningi í kendum teksti/tilfari.

    - Tá framløgan er liðug, tekur næmingurin eitt nýtt nummar, sum er knýtt at einum kendum teksti. Næmingurin fær eitt brot úr tekstinum at lesa upp. Tekstbrotið er grundarlag undir samrøðu/framløgu um kenda tekstin eftir sama leisti sum í framløguni frammanundan.

    - Eftir lokna framløgu verður næmingurin biðin um at fara útum eina løtu, ímeðan lærari og próvdómari umrøða próvtalið. At enda verður næmingurin boðin inn aftur í royndarhølið og fær próvtalið at vita.